

*– Vit skulu ikki taka ímóti allari ávirkan úr útlandinum, tí tað skal eitast at verða modernað. Vit hava eitt fantastiskt samfelag – eitt gott og tolerant samfelag, her vit eru trygg og hava tað gott, sigur Jenis av Rana*

MYND: JENS KRISTIAN VANG

## FAKTA

**Navn:** Jenis av Rana
**Aldur:** 58 ár
**Bústaður:** Havn
**Starv:** Løgtingsmaður og kommunulækni
Løgtingsmaður síðani 1994
Formaður í Miðflokkinum 1994-97 og síðani 2001

# Sigrar og ósigrar

**Jenis av Rana hevur í 17 ár verið landspolitikari, og hann hevur sum allir aðrir politikarar upplivað politiskar sigrar og ósigrar**

**Hvør er tín størsti politiski sigur?**
– Tað mann vera, at vit fingu avtikið einkarættin á loftmiðlaøkinum, so vit kundu fáa Guds orð út í himmalrúmið. Tað var eitt drúgt stríð, men tað lukkaðist. Hetta var eisini ein av orsøkunum til, at vit stovnaðu Miðflokkinum og fóru upp í politikk. Eg eri eisini glaður fyri at hava virka fyri, at Løgtingsins Umboðsmaður gjørdist veruleiki, og at vit nú hava javnsett øll børn í Føroyum, so at foreldur kunnu verða heima hjá teimum fyrsta sjúkradagin við løn.

**Hvør er tín størsti ósigur?**
– Eg meti tað sum ein ósigur, at eg ikki havi fingið gjørt meira við spurningin um fosturtøku. Talið á fosturtøkum í Føroyum er minkað seinnu árini, men vit eiga at tryggja, at øll børn hava rætt at verða fødd. Men stríðið hjá okkum í hesum máli heldur fram.

**Hvat vilt tú, at øll skulu vita um teg?**
– Um tey so einki annað vita um meg, so vil eg, at tey skulu vita, at eg elski Jesus.